# Sjálvstýrisflokkurin dettur ímillum í fullveldismálinum

*Sjálvstýrisflokkurin hevur ikki staðið seg væl í seinastu veljarakanningunum og fólk í flokkinum meta, at hetta boðar ikki frá góðum. Mett verður, at flokkurin hevur trupult við at selja vøruna og*

Dagfinn Olsen

Landsfundurin hjá Sjálvstýrisflokkinum verður um vikuskiftið og tað er Norðoya Sjálvstýrisfelag, ið skipar fyri.

Í veljarakanningum hevur flokkurin verið fyri afturgongd og ein av fyrrverandi ting- og landsstýrismonnum Sjálvstýrisfloksins í Norðoyggjum, Karl Heri Joensen, viðgongur, at kanningarnar boða ikki frá góðum.

- Tað er kanska tekin um, at flokkurin dugir ikki at selja vøruna. Flokkurin dettur niðurímillum í fullveldiskjakinum og viðvíkjandi teimum málum, ið flokkurin umsitur, so dugur flokkurin ikki nóg væl at fáa boðskapin út, metir Karl Heri Joensen.



**Bert stóru flokkarnir**

Tað kann tykjast, sum leikar hart á á fleiri mótum hjá Sjálvstýrisflokkinum. Flokkurin umsitur heilsumál, har tíðin tykist merkt av ov lítlari játtan til sjúkrahúsverkið, og fullveldismálið er nógv í fjølmiðlunum.

Karl Heri Joensen er ikki í iva um, at í fullveldismálinum dettur Sjálvstýrisflokkurin burtur ímillum.

- Tá fyrstu boðini koma í fjølmiðlunum, so síggjast bert stóru flokkarnir. Tað kunnu so fjølmiðlarnir hava skuldina í, men t.d. eftir samráðingarfundin týsdagin vóru bert umboð fyri stóru flokkarnar at síggja og hoyra. Ikki fyrr enn næstu dagarnar kom viðhangið við, sigur Karl Heri Joensen.

Í aðrar mátar er Karl Heri Joensen vísur í, at flokkurin dugir ov illa at selja førda politikkin og fáa rætta boðskapin út, tí t.d. hava pensjónistar fingið økt útgjald.

**Rætt at vera varin**

Viðvíkjandi úttalilsum hjá løgmanni og Helenu Dam á Neystabø, at tað kanska er rætt at fara varligari fram í fullveldisgongdini og kanska útseta í gildiskomuna av fullveldinum, er Karl Heri Joensen varin við at siga nakað ítøkiligt, tí hann hevur ikki sjálvur havt møguleika at fylgt gongdini heilt neyvt.

Men tað skilst á Karl Hera Joensen, at hann metir tað vera rætt at fara varliga til verka í fullveldismálinum, tí hetta heldur hann hóska best til tað, ið flestu sjálvstýrisfólk vilja.

Men hvørt lágu tølini í veljarakanningunum hjá Sjálvstýrisflokkinum eru tekin um trupulleikar hjá flokkinum, ið koma upp á landsfundinum, er ilt at siga.

Karl Heri Joensen ásannar, at trupult er hjá smáu flokkunum at gera seg galdandi og hann vísir á, at aðrir lítlir flokkar eru dotnir burtur ímillum. Hann heldur, at møguliga er hetta rákið í samfelagnum, so bert teir stóru flokkarnir verða eftir.

Karl Heri Joensen heldur tó, at rúm verður fyri einum lítlum flokki og um Sjálvstýrisflokkurin dugir nóg væl at fáa sín boðskap út, so kemur hann at standa eftir.

*Sjálvstýrisflokkurin dettur burtur ímillum í fullveldiskjakinum og viðvíkjandi teimum málum, ið flokkurin umsitur, so dugur flokkurin ikki nóg væl at selja vøruna og fáa boðskapin út, metir Karl Heri Joensen*
.





Ferðist 2 men gjaldið fyri 1

Føroyar-Keypmannahavn ella Billund og aftur *)
Fyri hvønn
1250,-
+ ferðaavgjøld
Børn 2-11 ár: -50%

Føroyar-Keypmannahavn-provinsfloghavn og aftur *)
Fyri hvønn
1950,-
+ ferðaavgjøld
Børn 2-11 ár: -50%

Bíligir ferðaseðlar frá Maersk
Frá 28. apríl til og við 19. juni ber til at ferðast við flogfari millum Føroyar og Danmark, so bíliga sum ongantíð áður. Einastu treytir, at fáa bíligar ferðaseðlar, eru vanligar apex-treytir, umframt at minst tvey vaksin skulu ferðast saman. Hoyr nærri um teir bíligu ferðaseðlarnar frá Maersk Air á tíni ferðaskrivstovu...

*) Ferðaseðlarnir skulu bíleggjast minst 7 dagar frammanundan. Broyting av bílegging kann ikki gerast. Ferðaseðilin kann ikki endurrindast. Ferðatíðarskeiðið skal fara um leygardag og sunnudag. Minst tvey vaksin skulu ferðast saman.

MAERSK AIR

petur & petur • 320870


# Malan Eyðunsdóttir á egnum beinum

Maluna Eyðunsdóttir kenna føroyingar við áhuga fyri tónleiki. Hon hevur, hóast ung, verið frammi á pallinum í mong ár.

Hon hevur gjørt vart við seg í fleiri høpum, men serliga gjørdist hon kend, sum limur í bókinum Mark No Limits og seinni við egnum bólki, Malan Eyðunsdóttir Band.

**Solo**

Um stutta tíð kemur Malan við egnari fløgu.

Fyrireikararnir hava sent út eitt lag á fløgu til fjølmiðlar og onnur at lurta eftir og tað er poppur á føroyskum, ið er hevur altjóða dám, ið talan er um.

Kári Jacobsen eigur lagið Alt við sama lag, og hann hevur eisini skrivað hini løgini, ið vit kunnu vænta okkum frá Maluni. Hann eigur nógvar vældámdar føroyskar sangir og byrjar at gera um seg uttanfyri landoddarnar eisini.

Hetta, at Kári eigur løgini, hevur fingið fyrireikararnar at setta skemtiligu gátuna saman: Hvat hava Grace Jones og Malan Eyðunsdóttir til felags?

Báðar hava Kára Jacobsen sum sangskrivara!!!

(Grace Jones sang lagið, sum Kári skrivaði til sjónvarpssendingina á TV3 Det perfekte Kup - *(blðm.)*).

*- do -*



*Brátt kemur Malan Eyðunsdóttir við egnari fløgu*





Mynd: Jens Kr. Vang

# Niðan í Gravardal fyri hálvan prís

*- Eg havi næstan ligið á knøðunum fyri at fáa babba at lova mær ein hest, sigur Judy*

*Ein gentudreymur gekk út, tá ið Judy Lützen í Klaksvík keypti sær ein íslendskan hest. Hann eitur Faksi, og verður saðlaður hvønn dag*

Høgni Mohr

Sekstan ára gamla Judy Lützen í Klaksvík dámar væl at ríða. Hvønn dag, árið á tamb, saðlar hon hest sín, Faksa. Oftast leggja tey bæði leiðina niðan í Gravardal. Íslendski Faksi er 17 ára gamal. Judy keypti hann í fjør frá Irdi Mikkelsen. Tær báðar kennast.

Vanligur prísur fyri ein tílíkan búnan gangara er einar 10.000 krónur, men kennskapurin millum sølukonu og keypara hevði við sær, at hesturin varð seldur fyri helvtarprís.

**Babba játtaði**

Áhugi Judys fyri ríðing varð longu vaktur í 7 ára aldri. Hon hevði eina javngamla vinkonu, ið var farin at ríða. Men fleiri ár gingu áðrenn Judy slapp at fáa sær hest.

- Eg havi næstan ligið á knøðunum fyri at fáa babba at lova mær ein hest, sigur Judy.

Tað krevur sítt at eiga og ansa rossi. Og tað veit Judy. Hon hoyggjar sjálv til Faksa, og tvær ferðir um dagin fer hon í bingjuna, sum Faksi býr í, at geva hoyggj. Fyrstu fóðringina - hana snimma á morgni - tekur pápin sær tíbetur av.

**Njóting fram um tvíspor**

Jens Kristian Vang, myndamaður okkara, sum sjálvur er íðin reiðmaður, heldur, at Faksi er væl riðin og í góðari venjing, tí hann verður saðlaður hvønn dag. Men Judy heldur hinvegin, at Faksi er heldur dovin.

- Hann er í hvussu so er alt ov dovin til kappríðing, staðfestir Judy brosandi meðan hon blídliga kembir síðhærda rossinum, sum hon kortini er so ómetaliga góð við.

Veðrið er gott, og Judy og Faksi fara aftur í dag at ríða tær leiðir, ið tey kenna best. Niðan í Gravardal meðan lívgandi geislar sólarinnar vekja várið í gentu og gangara.

# Kósarbrúgvin longd

*Um fáar vikur fáa klaksvíkingar 32 metrar av kei afturat*

Dánjal Højgaard

Arbeiðið, at leingja Kósarbrúnna byrjaði fyri einum ári síðani og hevur m.a. verið seinkað av einum skaða, sum hendi í ódnarveðri. Men nú er komið undir land.

Kósarbrúgvin er longd 32 metrar norðureftir og tá liðugt er stoypt um nakrar vikur ljóðar rokningin uppá umleið fimm milliónir krónur.

Tað hevur verið óarbeiðsligt á Kósabrúnni, serliga eftir at Fiskamarknaður flutti yvir á eystara armin at vera. Virksemið á Kósarbrúnni er stórt, og tað hevur ikki verið trygt at ferðast á havnarøkinum.

Nú kunnu skip leggja at beint yvirav bygninginum norðanfyri Kósavirkið, har Fiskamarknaðurin húsast. Eisini størri skip - sum risatrolarin Næraberg - kunna bindast har. Á norðursíðuni, á sjálvum keiendanum, verður atløgupláss til útróðrarbátar.

Tá ið havnarútbyggingin er av verður farið undir at rudda tað stóra økið norðan fyri Kósarbrúnna, so at tað eisini verður havnini at gagni.

Sum skilst er norðasti partur av Kósarbrúnni einki serliga veðurgott pláss, og tí hevur onkur hittinorðaður klaksvíkingur doypt hann lortendan. Viðrar ikki kunnu bátar og skip framvegis leggja at longur inni við Kósarbrúnna, og tá fer tann longda keiin, at lætta um ferðsluna til og frá skipunum.

Tað er Klaksvíkar Kommuna, sum fíggjar havnarútbyggingina í Klaksvík.



*Nú verður tryggari og meira arbeiðsligt á havnarøkinum, har Fiskamarknaðurin í Klaksvík heldur til*

Mynd: Jens Kr. Vang


HEIMA BIO




Deep Blue Sea




End of Days

VIDEOTOP 10

VIKA 18

1 Generalens datter
2 Deep Blue Sea
3 She's all that
4 Star Wars Den usynlige fjende
5 I Kina spiser de hunde
6 Asterix og Obelix
7 Familie Terapi
8 Sex Games
9 Wild Wild West
10 EDtv

Í Gundadali tel. 31 47 70
Í Kollafirði tel. 42 10 83
Í Saltangará tel. 44 91 33
Í Klaksvík tel. 45 73 53
Í Sørvági tel. 33 20 01
Í Leirvík tel. 44 33 60
Í Skálafirði tel. 44 12 00

STATOIL

støðirnar kring landið

petur & petur 320870